Kristian Meitil stendur her við eini havmús av Chimaera Mirabilis. Hetta slag er neyvan fingið í føroyskum sjógvi fyrr. Mynd Kalmar

Vit kenna lítið til djúphavið:

Hendan havmúsin er neyvan fingið undir Føroyum fyrr

–Vit taka avstoypingar at djúphavsfiskum og síðan koma teir við á okkara framsýning, sigur Kristian Meitil á Náttúrugripasavninum

Tá Magnus Heinason kom aftur av seinasta túrinum eftir búrfiski, hevði hann roynt á leiðum, har neyvan nøkur ella í hvussu er ógvuliga lítil roynd hevði verið fyrr við trolara. Og hetta var orsøkin til, at fleiri heilt sjáldsamir fiskar eisini vóru í trolinum.

Tá Magnus Heinason kom [illegible] Havnina komu eisini umboð fyri Náttúrugripasavnið umborð og teir eru altíð áhugaðir fyri tí sjáldsama.

–Millum annað hevði Magnus Heinason fingið fýra sløg av havmús og eitt av hesum sløgum kenna vit ikki í føroyskum sjógvi. Tað er Chimaera Mirabilis og mirabilis merkir á latíni undurføgur. Hetta er ein sera vakur og litfagur fiskur, sum er knallreyður tá hann verður fingin, men hann bliknar tá nakrir dagar eru [illegible]nir, [illegible] Kristian [illegible]l.

–[illegible]g veit ikki um tær eta hendan fiskin sunnanfyri. Vit fara so at gera eina avstoyping av honum og síðan verður hann við á framsýningini, sigur hann.

–Vit eiga iki so nógvar djúphavsfiskar á Náttúrugripasavninum. Hetta kemst av, at tað er ikki so lang tíð síðan at føroyingar byrjaðu at royna á djúpum vatni. Men vit eru áhugaðir at gera savnið størri. Í summar verða nógvir fiskar við á føstu framsýningini hjá Náttúrugripasavninum, sigur Kristi[illegible] [illegible]

justinus

Hetlendingar

Greiddu frá oljuroyndum

Herfyri vóru hetlendingar í Føroyum og greiddu frá sínum royndum av oljuvinnuni. Og hetlendingar hava notið gott av oljuævintýrinum. Hetlendingar hava fingið avroknað ein prosentpart av inntøkunum av oljuvinnuni og hesin peningur er nýttur til at byggja samfelagið upp. Hetlendska samfelagið er ikki at kenna aftur, síðan oljumilliónirnar byrjaðu at streyma inn. Fólkatalið er økt munandi og nógv ar beiði er. Hetlendingarnir vístu á, at føroyingar kundu fáa enn meira burturúr oljuni enn teir. Tí Føroyar hava eina heimastýrislóg og teir hava yvirtikið rættindini í undirgrundini. Hetland liggur beinleiðis undir Bretlandi.

justinus

Hetlendingarnir ferðaðust í Føroyum og teir vitjaðu m.a. í Suðuroy, har hendan myndin er tikin. Mynd Rógvi Johansen

Fashion

Klædnahandil, letur upp mikumorgunin kl. 8

TILBOÐ NÚ

Páskakjólar stoddir frá 3-10 ár	
Kjólar við flesum	198,-
Litfagrir blómu- prýddir	198,-
Silkikjólar	300,-
Til vaksin:	
Náttkjóli og slábrokkur úr sateng, sett	400,-
Slábrokkur úr sateng	350,-
Slábrokkur úr silki	375,-
Silkislips, hondmálað úr Vietnam	150,-
Jogging buksur	84,-

Vit halda [illegible] Step[illegible]ssons húsi á Kong[illegible]inni, niðastu hædd.

Fashion, er ein nýggjur og øðrvísin handil
Sum eitt stjørnuskot er hann her, fyri so at hvørva aftur
eina tíð og kemur so bráðliga aftur
Á henda hátt virkar Fashion, alt eftir tørvi fer hann gjøgnum
alt árið, at bjóða góð og bílig tilboð